Jóannes Eidesgaard undan endaspurtinum:

# Javnaðarflokkurin tann mest áhugaverdi

**– Fyri allar flokkar at samstarva við, og tí er eisini avgerandi, at hann vinnur endaspurtin í valstríðnum týsdagin sigur formaður floksins, sum heldur flokkin hava bæði bestu vælferðarskránna og besta boðið uppá at loysa ríkisrættarliga spurningin**

LØGTINGSVAL
*Jan Muller*




*Tað nú er upp til veljaran at gera av, hvør skal stýra landinum komandi fýra árini. Eg eri nøgdur við fundin í Norðurlandahúsinum, ikki minst tí at tað eydnaðist í stóran mun at fáa tey málini, sum flokkurin hevur lagt dent á, við í skránna fyri fundin, her serstakliga vælferðarøkið, sigur formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard*

Eftir eitt langt og drúgvt valstríð og eftir stóra valfundin í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið ætlar heldur formaður Javnaðarfloksins Jóannes Eidesgaard, at møguleikarnir hjá flokkinum at koma væl burtur úr endaspurtinum verða góðar. Jóannes Eidesgaard sigur, at tað nú er upp til veljaran at gera av, hvør skal stýra landinum komandi fýra árini. Sjálvur er formaður Javnaðarfloksins nøgdur við fundin í Norðurlandahúsinum, ikki minst tí at tað eydnaðist í stóran mun at fáa tey málini, sum flokkurin hevur lagt dent á, við í skránna fyri fundin, her serstakliga vælferðarøkið.

– Sjálvandi hevur ríkisrættarliga málið stóran týdning men fyri okkum hava vælferðarmálini størstan týdning, og tí fegnist eg um, at allir flokkar nú vilja tosa um hesi málini eisini.

## Sølustevna

Formaðurin í størsta andstøðuflokkinum heldur annars, at valstríðið hevur í so nógv verið merkt av eini marknaðarføring av einstøkum politikarum og flokkum. Tað hevur verið mest at líkna við eina sølustevnu, har tú fer út við nøkrum sjónarmiðjum, sum standa einsamøll í vindinum men sum ongatíð koma til eina veruliga politiska duell ella kjak. Jóannes Eidesgaard heldur,at tað politiska kjakið er dovnað nógv í valstríðnum.

– Eg meini, at eg havi ikki tosað um politikk hvørki við Høgna, løgmann ella Listbeth síðani valið varð útskrivað fyri seks vikum síðani. Tað er eitt sindur harmiligt, at hólmgongurnar og orðaskiftini eru blivin so nógv burtur í valstríðnum. Tey eru ikki bara eitt undirhaldsvirði fyri veljaran. Hesi geva honum eisini møguleika at meta um, hvussu sterkir flokkarnir standa í sínum valuppleggum.

Tann sannroynd skyldast kanska í stóran mun, at valið í so stóran mun verður stýrt av fjølmiðlunum. Teir gomlu veljarafundirnir hava kanska heldur ikki sama virði sum teir høvdu fyrr.

## Ov langt valstríð

Formaður Javnaðarfloksins setir eisini eitt stórt spurnartekin við, um ikki valstríðið er vorðið í so langt. Í Danmark hevur man valstríð í tríggjar vikur – okkara tekur seks. Man skal ansa eftir, at man ikki troyttar veljaran við at undirdíkja hann við politikki konstant í seks vikur. Tað er long tíð. Tí eigur man at umhugsa at avmarka eitt slíkt valstríð.

Jóannes Eidesgaard heldur annars, at stórur partur av valstríðnum hjá hinum flokkunum hevur snúð seg um Javnaðarflokkin, og tað fær hann at koma til ta niðurstøðu, at flokkurin má vera rættiliga áhugaverdur, og fer hetta eftir hansara hugsan eisini at síggjast aftur, tá farið verður undir at samráðast um eina nýggja samgongu.

– Man skuldi annars trúð, at tá tað hevur snúð seg um ríkisrættarliga spurningin og báðir mótpolarnir Tjóðveldið og Sambandið sum fóru upp at táttast, so fór valið at snúgva seg um teir og teirra valskráir, men so hevur ikki verið. Man hevur ístaín vant seg til ta støðu sum Sambandið hevur, og tí hevur Javnaðarflokkurin virka meira meira áhugaverdur fyri okkara mótpartar, og út frá hesum heldur Jóannes Eidesgaard, at Javnaðarflokkurin hevur markerað seg væl í valstríðnum.

## Greiða støðu til sjálvstýri

Uppá fyrispurning um ikki Javnaðarflokkurin kann fáa ein trupulleika í Suðurstreymoy, har veljararnir eru nógv meira sjálvstýrissinnaðir enn í øðrum valdømum sigur Jóannes Eidesgaard, at hetta er eingin loyna, men harfyri kann Javnaðarflokkurin ikki tosa við kloyvdari tungu.

– Vit hava eina greiða støðu til tann spurningin. Hatta er so heldur ikki tann spurningurin, sum flokkurin leggur størstu áherðsluna á. Javnaðarflokkurin er ein flokkur, sum sigur, at hann vil arbeiða fyri tí góða samfelagnum, og kunnu vit best røkka einum úrsliti í tí politikkinum í einum ríkisfelagsskapi, so er tað hann vit ganga eftir. Um tað vísti seg, at tað bara bar til at skapa tað góða samfelagið uttan fyri henda felagsskapin, so var tað tað vit fóru eftir. Støðan í dag er púra greið: vit kunnu best røkka úrslitum fyri tí politikki vit standa fyri innan fyri Ríkisfelagsskapin

Formaður Javnaðarfloksins leggur tó aftrat, at flokkurin ynskir at menna okkara sjálvstýri. Tað hevur hann eisini søguliga prógvað, men tað skal so vera við skili og við teimum møguleikum og fortreytum, sum eru galdandi. Jóannes Eidesgaard heldur tí avgjørt ikki, at nøkur orsøk er hjá sjálvstýrissinnaðum javnaðarfólki í t.d. Suðurstreymoy at venda flokkinum bakið, bara tí at aðrir flokkar hava onnur boð uppá sama sjálvstýri.

– Sjálvstýrislógin, sum vit hava lagt fram og vilja fremja, letur upp fyri øllum hasum møguleikunum. Hon er meira sjálvstýrissinnað enn tann leistur, sum samgongan nú hevur lagt, og har teir siga, at teir vilja arbeiða innan fyri Heimastýrislógina og líka fram til 2012, meðan Javnaðarflokkurin leggur upp til, at vit gera eina nýggja skipan, har tað er løgtingið, sum hevur avgerðina. Í so máta er Javnaðarflokkurin meira á sjálvstýrisleið enn tann kósin, sum samgongan hevur lagt, har teir siga seg vilja fasthalda Heimastýrislógina.

## Gott samstarv við smærri flokkar

Hvat heldur formaðurin í tí størsta andstøðuflokkinum um møguleikarnar hjá smærri flokkunum á miðjuni at koma sterkari úr valinum og harvið uppaftur trúligari kunnu blíva tungan á vágskálini í komandi samgongusamráðingum?

– Tað er sjálvandi tað, sum flestu av okkum eru so bangin fyri, nevniliga at vit enda í somu støðu sum fyrr, har tað verður ein av teimum smáu flokkunum, sum kann avgera, hvør fær valdið.

Hvat sigur formaður Javnaðarfloksins til tann møguleika, at teir smáu flokkarnir, um teir koma sterkir innaftur, heldur velja verandi stóru samgonguflokkar at skipa samgongu við enn Javnaðarflokkin?

– Eg haldi vit hava havt góða tradítión at kunna samstarva við Sjálvstýrisflokkin. Útmeldingarnar frá flokkinum seinastu tíðina hava eisini verið rættiliga markantar, at hann vil venda aftur til sín gamla sjálvstýrispolitikk, so eg dugi ikki at síggja, at eitt samstarv millum Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin ikki er rættiliga frammaliga.

Hvat Miðflokkinum viðvíkur, so heldur Jóannes Eidesgaard, at tá tað snýr seg um tær vanligu vælferðarskipaninar, so er Miðflokkurin ein desideraður javnaðarflokkur. – Jenis hevur í øllum málum vit hava lagt fram á tí økinum bakkað okkum upp.

Formaður Javnaðarfloksins heldur annars tað vera rættiliga løgið at mekja sær í hesum valstríðnum, at aðrir flokkkar hava líkasum roynt at yvirtikið part av valskránni hjá Javnaðarflokkinum og sipar hann her bæði til Miðflokkin og Sambandsflokkin.

## Mest áhugaverdur

Nú tað av álvara er farið inn í sjálvan endaspurtin í valstríðnum heldur Jóannes Eidesgaard, at Javnaðarflokkurin er vorðin tann mest áhugaverdi flokkurin.

– Tjóðveldisflokkurin liggur úti á sínum vongi og hevur ikki teir stóru møguleikarnar. Hann hevur bundið seg fastan í, at hann skal halda fast við fullveldiskósina, og tað vil siga, at teir, sum kunnu samstarva við hann, eru bara teir flokkar, sum kunnu vera samdir við hann, og soleiðis er eisini boðskapurin frá Tjóðveldisflokkinum. Á hinum vonginum hava vit so Sambandsflokkin, sum sigur, at hann heldur fast um nøkur onnur virði við øvugtum fortekni, og hann hevur higartil bara kunnað peikað á Javnaðarflokkin sum ein møguleika, meðan Javnaðarflokkurin, sum liggur mitt ímillum í tí ríkisrættaliga spurninginum, hevur jú í veruleikanum áhuga fyri báðar vengurnar. Og tekur man so tað kanska ivasomu plaseringina hjá Fólkaflokkinum við, so er Javnaðarflokkurin áhugaverdur í einum samgongumøguleika. Kanska er hann tann flokkurin, sum hevur størri rúmd at flyta seg í enn vengurnir hava.

## Skapa møguleikar

– Politikkur í Føroyum eigur at snúgva seg um, hvussu hetta samfelagið verður skipað fyri tað fólk sum býr her nú og fyri okkara eftirkomarar – og tí vilja vit fasthalda ta skrá vit hava lagt út við, har vit vilja skapa góðar møguleikar fyri allar føroyingar, bæði ung og eldri sigur Jóannes Eidesgaard, sum ætlar sær at brúka restinaav tíðini fram til valhølini lata aftur til at sannføra føroyingar kring landið alt, at við at atkvøða fyri Javnaðarflokkinum velur ein stabilitet og tryggan framburð ístaðin fyri óvissuna.



Flaggdagshald í Klaksvík:

# - Staðfesta, hvørji vit eru!

**Óvanliga nógv fólk vóru til flaggdagshaldið í Klaksvík hósdagin, sum var merkt av sól, summari og føroyskum hátíðardámi**

FLAGGDAGSHALD
*Ragnhild Ellingsgaard*



*Poul Færø, virkin trúðboðari í mong ár, helt flaggdagsrøðuna í Klaksvík*

**Klaksvík:** Sólin ditti sær at kaga fram, sum hon ikki hevur gjørt í langa tíð. Lýtt var í veðrinum, og ein rúgva av fólki hittust á Vágstúni til at hátíðarhalda okkara egna Merkið.

Onkur tók til, at eini 800 fólk vóru savnaði, men hetta tora vit tó ikki at gita nærri um. Ein sannroynd er tað tó, at long tíð er síðani, at ein slík rúgva hevur við til flaggdagshald í Klaksvík.

Bæði skótaliðini saman við Klaksvíkar Hornorkestri settu eisini sín dám á góða várdagin, og vóru við til at gera hann enn hugnaligari.

## Merkið boð um frælsi

Røðari hesu ferð var Poul Færø, sum í mong ár hevur verið virkin trúboðari og er kendur av flestu klaksvíkingum.

Í røðu síni legði hann stóran dent á, at vit føroyingar mugu minnast til, hvørji vit eru.

Hann legði út við teim gomlu føroyingunum, sum vunnu Merkinum virðing við teirra lívshættisligu sigling undir Seinna Veraldarbardaga. Poul segði millum annað, at hesi roysnisbrøgd útintu, at Merkið vann sær ta virðing, tað hevði uppiborið, tí teir, ið tað hevjaðu og kendust við, prógvaðu virðið tess við egnum lívi, líka til deyðan.

Viðurkenningin fyri hetta er tann æruarvur, at vit sum fólk í dag kunnu ganga undir frælsi.

– Merkið ber bæði við tess skapi og litavali okkum boð um frælsi, segði Poul.

## Nógvar møguleikar

Eisini tað meira andaliga fekk pláss í røðuni hjá Poul Færø.

Hann tók fram, at skapið á Merkinum boðar okkum frælsi sum jarðbúgvar, frælsi frá synd og øllum tí, sum hongur uppi í henni. Eitt frælsi, sum ikki er okkum í holdi borið, men sum er givið okkum av Skapara og Frelsara okkara.

Eisini litavali í Merkinum fekk umrøðu, og segði Poul, at her eru nógvir møguleikar at velja í, tí litirnir tala um alt tað, sum vunnið er higartil.

Eitt reinlyndi so hvítt og klárt, har hvør hjálpir hvør øðrum og er viðkomandi øllum.

Hin reyði liturin, sum sigur nakað um áræði og arbeiðshug bæði á sjógvi og landi, har sjógarpar og arbeiðandi fólk á landi ganga hond í hond, og luta korini bæði í gleði og sorg. Men hugaligast segði Poul tað vera at minnast hin bláa litin, sum er vónarliturin. Ein litur, har eingin hugur er at fella í fátt, men lívið so leikandi gevur enn størri áræði um avbjóðingarnar eru ræðandi.

– Hvør rík eru tit ikki í dag, børn og tey í manndómi. Lítið at teim møguleikum, sum liggja fyri framman. Latið »mót við vanda vaksa«, sum Victor Danielsen so væl smíðar saman, var boðskaðurin frá Poul til tey ungu.

## Fara væl um

Poul Færø endaði røðu sína við at minna okkum øll á hjartatáttin, sum hvør einasti íbúgvi í hesum landi situr inni við í sambandi við Merkið og tjóðina.

– Hjartatátturin er og verður títt háttalag í samfelagnum. Onkur hevur sagt, at »tanker er toldfri«, men eru teir nú tað?, spurdi Poul.

Víðari segði hann, at vit eru tað, sum vit hugsa. Poul tók fram, at tað eru hugsanir tínar í tí loynda, sum sjónliga og almen sermerkja títt lív.

– Tú kanst ikki hugsa eitt, og vera eitt annað, segði hann.

– Tískil er so umráðandi, at Hann, sum eigur skapi Merkisins, eigur teg og meg í huga og gerð. Tá vil tað verða ein sjálvfylgja at litir Merkisins sermerkja hin einstaka, so tað verður ein sjálvfylgja at kennast við tjóðina og fylkjast undir Merkinum, endaði Poul Færø røðu sína á flaggdagshaldinum í Klaksvík.



*Óvanliga nógv fólk hittust á Vágstúni fyri at hátíðarhalda Merkið*